granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Treytir fyri stuðli til útgávu av vísindaverkum o.l.

Við heimild í reglum um stuðul til útgávu av vísindaverkum o.l., samtyktar av granskingarnevndini 22. oktober 2015 við broytingum 5. desember 2019, verða fylgjandi treytir og stuðulsupphæddir ásettar:

1.
Umsókn um stuðul skal skrivast á oyðublaðið, sum er gjørt til endamálið, og skal sendast til granskingar@gransking.fo.

Ófullfíggjað umsókn verður avvíst.

2.
Stuðul kann latast til endurgjald fyri útreiðslur í sambandi við útgávu av javnlíkamettum vísindaverki.
Til útgávu av Open Access grein kann stuðulin í mesta lagi verða kr. 8.000.
Til útgávu av bók, eitt nú ritgerðum og greinasøvnum, kann stuðulin í mesta lagi verða ein triðingur av prentkostnaðinum uttan mvg, tó ongantíð meira enn kr. 25.000 fyri hvørja útgávu.

Stuðul til onnur serlig átøk kann í mesta lagi vera kr. 50.000.

3.
Meginreglan er, at stovnur/virki, sum umsøkjarin er knýttur at, rindar fyri útgávu av Open Access grein og fær játtaða stuðulin endurgoldnan. Um umsøkjarin sjálvur hevur rindað fyri útgávuna, skal stutt frágreiðing gevast um orsøkina, áðrenn endurgjald kann rindast.

Stuðul til bókaútgávu verður rindaður til forlagið, um ikki annað verður avtalað.

Stuðul til onnur átøk verður rindaður sambært avtalu.

4.
Játtaður stuðul verður útgoldin, tá skjalprógv fyriliggja.

Kravd skjalprógv:

**Open Access grein**
1. Skjalprógv fyri javnlíkameting av útgávuni.
2. Kvittan fyri gjald til open access útgávu.
3. Grein í pdf og/ella leinki til grein á netinum.

**Bókaútgáva**
1. Skjalprógv fyri javnlíkameting av útgávuni.
2. Samlað fíggjarætlan við avriti av prenttilboði/kostnaði og upplýsingum um annan stuðul.
3. Eintak av útgávu.

**Annað átak**
1. Hóskandi skjalprógv fyri, at átakið er ella verður framt sambært ætlan.

5.
Granskingarráðið kunnger á heimasíðuni, hvat stuðul er latin til.

Í samráð við stuðulsmóttakaran kann grein eisini verða skrivað til gransking.fo um útgávu ella átak.

Góðkent á fundi hjá Granskingarnevndini tann 22. oktober 2015, broytingar góðkendar á fundi hjá Granskingarnevndini 5. desember 2019.

Wilhelm E. Petersen
formaður

Erika A. Hayfield
næstforkvinna